gult22 cyan22 magenta22 svart22



gult23 cyan23 magenta23 svart23



Fuglafjørður tann 8. apríl 2001

# MINNISLEPI

## eftir at hava lisið grein eftir Carl Jóhan Jensen í Fregnir

*Alexandur Kristiansen*

Ein fríggadag seinast í mars mánað hitti eg ein av mentunnarritstjórunum á Fregnir, Carl Jóhan, á máli. Hesin hevði ringt frammanundan, og høvdu vit avtalað at hittast til eitt prát um millum annað ta nýggju starvslønina, sum Mentunnargrunnirun er farin at lata, og sum undirritaði hevur fingið í trý ár.

Í telefonini vildi hann hava at vita, hvar eg búði, og greiddi eg honum gjølla frá tí, segði, hvussu hann skuldi ferðast, at hann helst noyddist at skifta buss í Leirvík, og at hann skuldi fara úr við tað fyrsta steðgistaðið í bygdini beint innan fyri Gjógvará.

Haðani eg búgvi er stutt at ganga yvir til steðgistaðið, og eg helt meg vera í góðari tíð, tá ið eg stakk meg í stivlarnar og skundaði mær yvir at taka ímóti hesum gestinum, eg skuldi fáa, eitt sindur spentur var eg eisini, tí Carl Jóhan er ikki hvør sum helst, hugsaði eg; men bussurin var longu farin framvið, og eingin maður var at síggja. Mundi hann hava misskilt okkurt? Hevði hann kanska gloymt at skift buss í Leirvík? Nei, hugsaði eg, Carl Jóhan er alt ov gløggur til at misskilja nakað.

Mundi hann hava gloymt at trýst á reyða knøttin, sum fekk bussin at steðga, hugsaði eg so aftur, á, harragud, so er hann helst endaður heilt norðuri á Havsbrún.

Eg fekk ikki stundir at hugsa meir, tí tá síggi eg hann koma fetandi heim eftir ógvuliga álvarsamur á at líta, í myrkum hálvsíðum jakka, í turriklæði vundið fleiri ferðir um hálsin, ein rættur bohemur, hugsi eg við mær, ikki í hatti, sum eg hevði væntað, men í keppi. Og eg hugsaði, her standi eg hattleysur, hugsaði eg, ein proletarur í gummistivlum og einum grønum vindjakka. Hevði hann so av illum verið reyður. Men vit heilsast og fara til gongu út í Rossagerði.

Á vegnum prátaðu vit eitt sindur um gamlar dagar, og sigur hann tá, at seinast hann var í Fuglafirði var fyri tjúgu árum síðan, á einari varmakeldustevnu. Vit fara eftir brúnni um Gjógvará, og eg sigi við hann, at tað er ikki til at vita við hesum bussunum og spyrji, um hann ongan bil hevur. Nei, tað hevði hann ikki. Eg sigi við hann, at nú var eg blivin bangin um hann, nú eingin bussur kom. Nei, hann hevði bara gloymt at farið av, hann var farin skeivur og var endaður niðri í bygdini, segði hann.

Komnir út í Rossagerði 11, har eg búgvi, vísi eg honum soleiðis hissini og meira at kalla í skemti á bilin hjá okkum, sum nú man hava tænt fyri seg, og sigi, at nú verða helst ikki ráðini at skifta hann út í bræði. Hann hevur hug at smílkast, men nikkar bert og kveitir uppá tekjuna og spyr, um ikki lekur, tá tekjan er so fløt, sum hon er. Nei, har er tætt, sigi eg, meðan vit ganga oman trappurnar, og soleiðis koma vit at úthurðini, og soleiðis verður hetta vanliga prátið millum tveir menn, ið ætla at seta seg niður eina løtu at skifta orð um bókmentir, lagt afturum.

Vit fara inn, og eg bjóði honum innar í stovuna, eri einsamallur inni henda seinnapartin, eg og so eitt hundsdýr, ið hevur tað fyri at amast upp á øll komandi, eisini henda nýggja gestin, sum tykist at hava ampa av hesum. Hvølpurin veit helst ikki, at beinið á hesum manni ikki er at spæla við, so eg fái beint hann uttar í køkin og gevi honum eitt annað bein at gnaga. Bilin ja, sigur hann so og tykist hava hugsað eitt sindur um hetta her, eg segði honum um bilin, og vil hava at vita, hvat eg meini við, og eg sigi við hann, at tað at fáa starvsløn er eitt, og alt gott um tað, hetta var tað besta, ið kundi henda mær í løtuni, sigi eg; men tað vil ikki siga tað sama sum, at ein nú kann fara og flotta sær. Nei, als ikki. Og sigi eg so, at fyri meg merkir hetta, at eg fari niður í løn. Hetta sigi eg honum, meðan vit sessast hvør sínum megin borðið, eg við bakinum móti vindeyganum, so tá ið hann onkuntíð spyr um okkurt, hann hevur borið eygað við uttanfyri ella hinu megin fjørðin, noyðist eg at venda mær við til tess at síggja og fáa svarað honum. Bjóði honum ein kaffimunn, nei, hann vil heldur hava te, sigur, at hann helt, at øll bygdafólk drukku te, sigur hann. Ver ikki býttur, sigi eg og fortelji honum so, at bygdafólk drekka einki veikari enn kaffi.



Eg so at gera ein temunn, men hvat. Tá ið hann skeinkir sær uppí, spyr hann, um hetta ikki er dekan ov veikt. Nú veit eg, at tað er lítið og einki, ið sleppur undan eygum hansara, so eg at hyggja, og tá síggi eg, at hatta er einki annað enn skáldandi heitt vatn, eg havi bjóðað honum, eg hevði gloymt at koyrt teposar í kannuna. Men hetta varð skjótt fingið í rættlag, og vit kundu fáa okkum.

Eg veit ikki, um eg havi øll søvnini her, byrjar hann so og breiðir tey út um borðið. Havi lænt tey á bókasavninum nú í morgun. Eg síggi ikki tey trý søvnini við týðingum, eg havi givið út, og okkurt annað manglar eisini. Nei, her manglar okkurt, sigur hann og flytur tey ymsar vegir.

Eg havi okkurt liggjandi onkustaðni, sigi eg við hann og fari eftir einum savni, vit júst hava tosað eitt sindur um. Tú kanst bara hava hatta, sigi eg við hann, har er nóg mikið til. Eg síggi, at hann hevur fingið sær ein lítlan blokk upp í hondina og ein penn, og tá ið vit hava sett kopparnar eitt sindur til viks, og eg havi ballað mær eina twin, heldur hann seg til, setur seg betur til rættis á stólinum og leggur blokkin á borðið framman fyri sær. Spyr, um tey ikki eru eitt sindur í andsøgn við hvørt annað tey fyrstu søvnini hjá mær og vísir á, at har var eitt rættiligt umskifti frá tí fyrsta savninum til tey, ið komu aftaná.

Nú havi eg so ofta verið spurdur um hatta og havi greitt frá hví og hvussu; og alt hatta har stendur at lesa ymsastaðni, so eg hevði ongan serligan hug at koma inn á hatta einaferð aftrat. Men eg gekk tó við til eftir førimuni at greiða frá, hvussu alt hekk saman, og tað er ein longri søga. Bað hann ikki dvølja ov leingi við tað gamla og bað hann staðiliga um ikki at prenta nakrar av teimum gomlu, teimum hevdbundnu yrkingunum, sum hann kallar tað, í blaðið. Hevði betur hug til at tosa um tað nýggjara og serliga týðingarnar, eg havi latið úr hondum tey seinastu árini.

Tú hevur ikki lisið amerikanararnar? spyr hann og fer at blaða í Jomfrúnni, og eg rokni við, at hann meinar við teir, sum komu fram í fimmti og seksti árunum. Nei, sigi eg, teir havi eg ongantíð lisið. Men fyri tretivi árum síðan las eg nógv av tí, sum yrkt var í Danmark um tað mundið og seinast í sekstiárunum, teir sokallaðu konkretistarnar. Og nevni eg sonøkur nøvn fyri honum, Laugesen og Hans Jørgen Nielsen td. Eg sigi honum, at hetta nýggja teir komu við helst hevur hugtikið ein ungan skaldaspíra, sum so beinanvegin er farin at eksperimentera og spæla við orðunum, og at yrkingarnar í Jomfrúnni fyri ein stóran part eru frá hesum tíðarskeiði.Hann vísir mær á yrkingina Ein fuglur flýgur, og eg nikki játtandi, hatta er ein av teimum, sigi eg.

Men hvussu við amerikanarunum, spyr hann uppaftur. Og eg noyðist aftur at viðganga, at teir havi eg ikki lisið. Kanska umvegis, heldur hann fram, gjøgnum teir donsku, sum í sínum lagi eru ávirkaðir haðani, spyr hann so. Jú, tað er møguligt, sigi eg, eg veit ikki. Síggi, hann krutlar eitthvørt niður í blokkin og leggur pennin frá sær. Førkar av handahógvi onkra bók og fer við hondini niður í lumman, seigliga. Kemur upp aftur við einari lítlari dós til støddar sum ein fingurbolli og brettir lokið omanav. Bomm? spyrji eg. Tá smílkar hann aftur og sigur, at hetta er skrá, hann hevur fingið sær fyri vana at brúka, og greiðir mær eisini frá, hvar hetta fæst til keyps. Eg sigi honum so frá abba mínum, hvussu mamma plagdi at forsyndast inn á hann, tá ið hann gekk yvir at vaskinum og sprændi síni skráspýtt niður í frárenslið; men tá vóru eisini aðrar tíðir, og skráirnar stórar sum lakresstengur, sigi eg, og ikki sum hetta fínkulturella nartlið, teir tyggja nú á døgum, sigi eg, tá ið eg síggi hann stinga okkurt svart inn í munnin. Hann smílkar aftur og tykist vera vælnøgdur, setur seg væl afturá í stólinum og tekur pennin aftur í hondina.

Hvat er ein góð yrking, heldur tú? spyr hann so og tyggur ófórt. Eg veit ikki rættiliga, sigi eg, tað er ikki so lætt at svara uppá. At alt í henni samsvarar, sigi eg so. Kanst tú royna at orða tað eitt sindur neyvari? spyr hann aftur. Tja, sigi eg, at evnið og orðini hóska saman. Annars finst einki eintýðugt svar upp á hatta har, øll eru vit ikki líka, sigi eg, tað, eg haldi vera gott, er kanska alt annað enn gott í eygunum hjá øðrum. Eisini yrkjararnir eru ólíkir og yrkja á hvør sín hátt, og sjálvandi royna teir hvør í sínum lagi at skriva góðar yrkingar, eingin fer bevíst at skriva vánaligar yrkingar, tí finnur tú góðar yrkingar bæði hjá Jóanesi Nielsen og hjá Christiani Matras..

Hevur tú nakað dømi um eina yrking, tær dámar? tekur hann afturíaftur; og nevni eg so nakrar, eg komi í tankar um, onkra eftir Chr. Matras, Vallarar eftir Líggjas í Bø, og nevni eg so yrkingina hjá

Goethe Uber allen Gipfeln, bæði tí at hon er stutt og tískil løtt at minnast, og tí at tú mestsum hoyrir tað veldiga suffið, tá yrkingin endar, har er nakað av tí rætta, sigi eg, men ringt er at seta orð á tað.

Kanska er tað orðið sál, man skal brúka, kanska er ein góð yrking sálin, sum er fest á blað, nei, eg veit ikki.

Hvat skal ein yrking gera? tráspyr hann og leggur ta fortugdu skráina í øskubikarið, og nú síggi eg rættiliga, hvussu lítil hon er, sum ein trivaligur døkkormur. Vit hava tømt kopparnar ið hvussu er tvær ferðir, og eg spyrji hann, eftirsum hann ikki koyrir sjálvur, um hann vil hava eina øl, eina gull, spyrji eg. Jú, tað vil hann fegin. Eg fari so eftir tveimum ølum, og vit munna okkum á tær. Hvat skal ein yrking gera? spyr hann aftur. Tja, eg veit ikki, sigi eg, siga tað, sum vit sjálvi fegin kundu hugsað okkum at sagt; tað er sum við málningum, innihald og formur mugu passa saman, tað er ikki nokk, at evnið er nýtt og uppfinnsamt, nei, eg veit ikki, hatta er øgiliga ringt at seta orð á.

Hann fer aftur í lumman eftir einari skrá og kveitir út gjøgnum vindeygað, nevnir okkurt um húsini yviri á hinum landinum, og eg noyðist at snúgva mær á at síggja hesi húsini, hann sipar til. Sum ein málningur standa tey har ovarliga í bønum, grálig í hesum táminum, sum hongur niðurfyri, okkurt hvítt sløðist innímillum.

Eg snúgvi mær aftur at borðinum, og práta vit eina góða løtu um Regin Dahl serliga og Christian Matras. Eg nevni aftur eina yrking fyri honum, eg haldi vera góða. Her leikti tær lendið løg inn í sál, sigi eg, er ein góð yrking. Men sum tann gløggi eygleiðari hann er, sær hann alt fyri eitt, at har er eitthvørt, ið haltar. Hann vigar orðini eina løtu, áðrenn hann eitt sindur ivasamur tekur hesa einu regluna upp aftur og mestsum kveistrar hana frá sær: bókstavarím, sigur hann so, nei, tá dámar mær betur orðið spældi, sigur hann og endurgevur: Her spældi tær lendið løg inn í sál. Jaso, sigi eg.

Hann hevur drukkið hálva ølina og vil ikki reiðiliga sleppa hesum spurninginum, hvat ein góð yrking er, sum tykist vera honum til so stórt fortreð. Ert tú kanska eitt sindur konservativur? spyr hann. Ja, tað kann væl vera, at eg hugsi nakað nógv á handa bógvin; men eg haldi allíkavæl ikki, at tað er neyðugt at skilja alt út í odd og egg í einum listarverki fyri at halda, at tað er gott ella ringt,

og vísi aftur á yrkingina hjá Goethe, sigi honum, at í mínum týðingararbeiði eri eg komin fram á minst tríggjar norskar, tvær danskar og fleiri svenskar týðingar av hesi somu yrking, men av øllum hesum týðingunum, er tað bert tann føroyska, tann hjá Janusi, ið er á hædd við tað týsku upprunayrkingina. Hinar eru allar at kalla bleikar eftirgerðir, ið ikki hava fingið við hesa sælu stundandi hvíldina, friðin, sum er yvir øllum og hesa varligu kensluna av, at vit at enda í ómegd suffandi gerast ein partur av alheiminum. Í hesum føri tykist tað, sum at flestu týðararnir ikki rættiliga hava fingið tann djúpa andadráttin ella sálina, sum eyðkennir upprunayrkingina, við, sigi eg og skoyti mestsum í skemti uppí, at eg onkuntíð havi hugsað, um eg møguliga hevði klárað at flutt hesa yrkingini yvir í føroyskt á ein nøktandi hátt. Nei, altso, tað hevði verið óðamannaverk at roynt, tí hatta kann eingin gera betur enn Janus. Nei, eg veit ikki, sigi eg, tað ber ikki so væl til at siga, hvat ein góð yrking er. Her hava vit eina góða týska og eina góða føroyska yrking og nakrar minni góðar og vánaligar yrkingar á øðrum málum. Allar viðgera tær sama evni, so tað er ikki har, problemið er, sigi eg, kanska er tað í hesum føri búnin, sum er avgerandi, nei, eg veit ikki, har má samsvar vera. Eg kveiti yvir á blokkin hjá honum og fílist á, at hann hevur skrivað dekan ov lítið. Minnist tú nú alt, spyrji eg, tú skrivar einki. Á jú, eg skrivi greinina beinanvegin, eg komi suður, eg havi tað í minninum.

Fyri at tosa um barnarímurnar, sigur hann. Spyr, hvussu tað er at yrkja fyri børnum, um mær dámar tað, og um ein ikki noyðist at seta seg í teirra stað, at skilja teirra hugsunarhátt? Eg sigi, at mær dámar sera væl at yrkja hesar tvætlirímurnar, sum eg kalli tær, tað er stuttligt at sita soleiðis og framvegis kunna spæla við orðini; og at skula seta seg í teirra stað, nei, tað haldi eg ikki mær nýtist, nei, eg veit ikki, konan plagar at siga í skemti, at eg eri barn enn. Eg lesi tvær nýggjar rímur upp fyri honum, og hann flennir hart, tá ið hann fatar poengið og vil sleppa at hoyra eina aftrat. Tað tykist, sum hevur hetta onkursvegna nomið við hann, tí hann biður meg vælsignaðan lata seg fáa tær at seta í blaðið saman við greinini. Men eg veit ikki, helst hevur hann skift meining á veg suður aftur, ella kanska er tað vegna plásstrot, at tær ikki komu við.

Ølirnar eru um at vera tómar, tá ið vit fara at tosa um mínar týðingar, væl at merkja tær, sum eru at finna í onkrum savni frá sjeytiárunum. Eg royni at snúgva prátinum inn á týðingarnar í teimum trimum týðingasøvnunum, eg havi givið út tey seinastu árini, men tað er hann einki við uppá, ber seg eitt sindur undan og fer aftur at blaða í savninum Málið er mítt øki, sum kom út í 75, har nakrar týðingar standa í. Spyrji hann, um hann hevur lisið mínar týðingar, og viðgongur hann tá trekliga, at tað hevur hann ikki, spyr hastiliga, um eg lesi nógv. Jú, svari eg, tað havi eg altíð gjørt. Kanst tú nevna onkur útlendsk, ikki norðurlendsk, skald td. úr farnu øld, sum tær dámar væl? Og nevni eg so til dømis nøkur amerikansk skøld, sum komu aftan á Withman, eg vísi á Sandburg, sum mær kortini ikki dámar so øgiliga væl, Crane og Pound.

Hann kveitir at urðinum og spyr, nær næsti bussurin fer, hann má royna at sleppa suður aftur við honum, sigur hann. Ølirnar eru tømdar, og vit práta eina løtu um tað at týða yrkingar.

Hvussu við norðurlendskum lyrikki? spyr hann so einaferð og fær sær aftur pennin uppí hondina. Eg sigi honum, at fyrr fylgdi eg væl við tí, ið fyrifórst í danska bókaheiminum, til fyri umleið 20 árum síðani, táið ungir yrkjarar sum Pia Tafdrup og Sørin Ulrik Thomsen byrjaðu at yrkja. Tey las eg kortini bæði tvey, men síðani havi eg ikki fylgt nakað serligt við. Men F. P. Jac havi eg ongantíð lisið, sigi eg. Hann nyttar heldur einki, sigur hann og spyr so: Hvussu við Michael Strunge? Nei, sigi eg, hann havi eg heldur ikki lisið.

Hvat hevur tú í umbúna at fara undir nú? Eg greiði honum síðani frá einum savni, eg leingi havi hugsað mær at gjørt, men sum ikki enn hevur fingið sítt endiliga skap. Nevni, at tað onkuntíð hevur mint meg ov nógv um td. Amagerdigte hjá Rifbjerg, men at eg stundum havi broytt hesar tekstirnar bæði henda vegin og handa vegin. Hann nevnir so yrkingina hjá Chr. Matras Fólk í huganum, spyr, um tað kanska er handa vegin eg ætli mær. Nei, tað hevði ikki verið ætlanin.

Men fyri at koma aftur til tínar yrkingar fyri vaksin, sigur hann, so er seinasta savnið hjá tær Staksteinar, sum kom út í 1990, og sum eg haldi vera eina sjáldsama góða bók í mun til fleiri av hinum. Sigur hann og fer at blaða í henni, vísir mær á fleiri yrkingar og ger onkrar viðmerkingar, og tað er týðiligt, at hesa bókina hevur hann lisið.

Vit royna at hava eyguni eftir bussinum, sum plagar at fara norður á keiøkið at venda, áðrenn hann tekur seg heim aftur gjøgnum bygdina. Hann kveitir at klokkuni. Vit hava sitið útivið tveir tímar og skift orð um hetta ymiska, og hann ger seg til at fara, savnar sær bøkurnar, hann hevur lænt, saman og stingur í skjáttuna. Eg kveiti aftur yvir á blokkin hjá honum og spyrji uppaftur, um hann nú hevur fingið alt við. Tá síggja vit bussin á veg heim aftur, og hann noyðist taka dik á seg, skal hann ikki verða ov seinur. Eg sendi tær greinina at hyggja ígjøgnum, sigur hann á veg út í gongina, har hann rippir jakkan til sín og kvikliga vindur turriklæðið nakrar ferðir um hálsin, so hann fær meg at hugsa um eina nýromantiska kransakøku. So er hann uttanduraður. Skundmikil maður, hugsi eg við mær sjálvum, tá ið eg síggi hann fara so hastiliga yvir móti bussinum.

Og kanska er tað eisini ein orsøkin, hugsi eg, kanska hevur hann alt ov nógv um at vera, kanska er tað tað, hugsi eg, tá ið eg lesi greinina í Fregnir; men er tað so, at hann ikki hevur stundir, so kundi hann bara havt sent mær greinina, so kundi eg havt rætt honum eina hjálpandi hond, tað hevði einki verið til hindurs fyri tí, hugsi eg.

